## Minni arbeiðsloysi í Íslandi

Í juni vóru í meðal 14.091 íslendingar skrásettir sum arbeiðsleysir, sum svarar til 8,1 prosent av teirri arbeiðsføru fjøldini. Sostatt vóru í meðal 504 færri arbeiðsleys í juni enn í mail. Samanborið við juni í 2008 er arbeiðsloysið sera stórt, tí tá vóru 1.842 fólk ella 1,1 prosent arbeiðsleys. Íslendski Landsbankinn ger vart við, at tað er vanligt, at arbeiðsloysið er minni í juni og juli, tí fleiri fáa ymiskt summararbeiði, og at tað so veksur aftur í august. Hagtølini fyri juni vísa, at arbeiðsloysið er størst á leiðini við Reykjavík, og at tað minsta arbeiðsloysið er norðanfyri.



## Statoil er størst

Norska oljufelagið StatoilHydro er millum tey størstu vinnufeløgini í heiminum. Tað skrivar amerikanska tíðarritið Forbes. Blaðið hevur eitt yvirlit yvir 500 tær størstu vinnufyritøkurnar í heiminum, og har er StatoilHydro nummar 36. Á sama lista fyri 2008 var norska felagið nummar 59. StatoilHydro er ein vinnurisi við næstan 30.000 starvsfólkum og einum umsetningi, sum var góðar 116 milliardir dollarar í fjør. StatoilHydro er eisini nógv tað størsta vinnufelagið í Norðurlondum. Danska A.P. Møller-Mærsk er nummar 1006 á heimslistanum. Umsetningurin hjá felagnum var í fjør góðar 62 milliardir dollarar. Heimsins størsta vinnufyritøka er Royal Durch Shell.

# Nýkrím– fyrr svínakrím



## Nýkrím á heimsplani

Kring allan heimin eru sambært heimsheilsustovninum hjá ST, WHO, staðfestir 94512 tilburðir av Nýkrími og tilsamans 429 deyðsføll av hesum.

Tilburðir av Nýkrími, ið eru immunir fyri Oseltamivir (Tamiflu) eru staðfestir í Danmark, Japan og Hong Kong. Tilburðirnir vóru hjá trimum fólkum, ið høvdu mjúk sjúkueyðkenni, og sum øll eru komin fyri seg aftur.

Virurnar, ið vóru immunar fyri oseltamivir (Tamiflu), reageraðu upp á zanamivir (Resilenza), og verða mett sum støk føri. Tí verður eingin broyting gjørd viðvíkjandi viðgerðini av Nýkrími.

*-rn*

*Við einum rutuflogfari hjá Atlantsflog tann 7.juli klokkan 14 kom nýggja krímið, eisini fyrr nevnt svínakrím, til Føroyar. Leygardagin kom veruliga røringur í føroysku tilbúgvingina, tá fyrsti tilburðurin varð staðfestur, og boð vóru send eftir einum heilum barnagarði og foreldrum at børnum har um at koma til kanningar. Skjótt eftir stóð ein long bíðirøð av bilum uttanfyri Landssjúkrahúsið, har kanningar vóru tiknar meðan fólkini enn sótu í bilinum*

*Mynd: Jan Müller*

til álvarsligt. Enn er ov tíðliga at siga, um nýggja virusið kann menna seg í mildari ella álvarsligari rætning.

### Hvussu skal eg fyrihalda meg eftir heimkomu frá landi við nýkrími?

Um tú ert raskur/røsk, eru eingi varsemisráð.

Við sjúkueyðkennum til krím skal man í dagtímunum ringja til læknan hjá sær og í náttartímunum til læknavaktina. Um læknin metir, at vandi kann vera fyri smittu við nýkrímsvirusi, verður avtala gjørd um at taka eina roynd.

Tað er umráðandi, at sjúk fólk ikki møta upp í bíðihølunum hjá læknanum, tá vandi kann vera fyri at smitta mong menniskju.

### Hvussu verður nýggja krímið viðgjørt?

Vanliga krevur krím ikki viðgerð.

Nýggja krímvirusið er viðkvæmt fyri Oseltamivir (Tamiflu).

Tað er uppgáva hjá lækna at taka støðu til møguliga viðgerð.

### Er tað eitt gott hugskot at nýta Tamiflu fyribyrgjandi?

Sundhedsstyrelsen mælir heilsustarvsfólki og vanligum fólki frá at nýta fyribyrgjandi Tamiflu. Tey einastu, ið mælt verður til nýta fyribyrgjandi viðgerð, eru fólk, ið hava havt beinleiðis samband við sjúklingar, sum eru í viðgerð orsakað av illgruna um smittu við nýggja kríminum. Tað er umráðandi at læknar ikki ókritiskt útskriva Tamiflu ella onnur virusevni.

### Finst nøkur koppseting móti nýggja kríminum?

Enn finst eingin koppseting móti nýggja kríminum. Landsapotekarin upplýsir, at ein koppseting verður klár um tveir til tríggjar mánaðir.

### Kann mann fáa nýggja krímið við at eta svínakjøt?

Nei, tað er ikki gjørligt at fáa krímið av at eta hitaviðgjørt svínakjøt ella aðrar vørur av svínakjøti.

### Er tað trygt at ferðast til øki, har nýggja krímið er staðfest?

Fólk, ið hava ætlanir um at ferðast til lond við staðfestari smittu av nýggja kríminum, verða mælt til at halda seg dagførd inni á relevantum heimasíðum (Statens Serum Institut, Udenrigsministeriet, WHO og heilsumyndugleikunum hjá umtalaðu londunum).